

www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 08 - 2012

# Indarar ætla sær eisini til Arktis

Arktiska økið er eitt av stóru málunum, ið verða viðgjørd á altjóða oljumessuni og -ráðstevnuni í Stavanger. ìsurin bráðnar sum ongantíð fyrr, og tí koma bæði møguleikar og avbjóðingar til sjóndar. Altsamt fleiri lond vilja hava sín part av køkuni í Arktis. Teirra millum Kina og Suðurkorea. Men kinesarar eru ikki teir einastu asiatarnir, sum hava áhuga í teimum arktisku økjunum. Nú liggur indiska oljufelagið ONGC, sum er eitt tað størsta oljufelagið í Asia, framvið at sleppa norður í póløkið. Sambært Barents Observer hevur tað indiska felagið biðið russiska felagið Rosneft um at sleppa at vera við í einum av tess verkætlanum í Arktis. Men tað er ikki bara Rosneft, sum hevur áhuga í India sum samstarvsfelagi. Næst á ynskilistanum hjá indarum standa Statoil, Exxon Mobil og Eni. Fyrr í ár skrivaðu Statoil og Rosneft undir eina samstarvsavtalu um at leita eftir olju og gassi á nøkrum ókannaðum leiðum á russiska landsgrunninum og í Barentshavinum. Rosneft hevur tilsvarandi avtalur við Exxon Mobil og Eni. Sum er eigur Rosneft 67 prosent í hvørjari verkætlan, men indiska ynskið er, at Rosneft skarvar av sínum parti og letur ONGC koma inn sum triði partur. Tað ljóðar, at indarar hava eisini víst áhuga fyri LNG-verkætlanini Yamal, sum Novatek og Total hava ment. Indarar hava ongar royndir í Arktis, men teir hava drúgvar royndir frá frálandavinnuni, sum teir hava verið virknir í síðani í sjeytiárunum. ONGC framleiðir í dag umleið 77 prosent av allari oljuni og 81 prosent av øllum náttúrgassinum, sum verður framleitt í India. Staturin eigur 74 prosent av felagnum. Arktis og oljuleiting har hevur annars høga raðfesting á altjóða oljumessuni í Stavanger í hesum døgum. Oljan.fo fer komandi dagarnar at viðgera bæði møguleikarnar og avbjóðingarnar í arktiska økinum. Hesin áhugi kemur serstakliga í kjalarvørrinum av veðurlagsbroytingunum, sum eru sera sjónskar í Arktis. Ì gjár boðaði NASA frá, at ongantíð áður hevur ísurin í Arktis